# Clare á Klaksvík

**Tann 1. oktobur byrjaði Clare at sigla á Klaksvík. Hvønn týsdag framyvir verður farmaskipið at síggja við kei í Klaksvík**

FLUTNINGUR
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:** Clare fer av Havnini til Klaksvíkar fyrrapartin og av aftur Klaksvík seinnapartin aftur til Havnar. Síðani leggur hon eisini at á Tvøroyri, áðrenn leiðin gongur til Aberdeen.

Heðin Joensen, sølu-og marknaðarleiðari á farmadeildini hjá Smyril Line sigur, at enn er so stutt frá-liðið, so tað ber illa til at siga, hvussu tað fer at roynast.

– Men vit vóna sjálvandi, at undirtøkan fyri hesum fer at verða góð, sigur Heðin Joensen.

Hann leggur afturat, at tey sjálvandi fara at eftirmeta hesa leiðina við jøvnum millumbilum, fyri at staðfesta um tað nú er tað rætta og skilabesta at gera. Og fyri at síggja, um tað loysir seg.

Heðin greiðir frá, at tosið um at fáa Clare at sigla á Klaksvík byrjaði longu tá verkfallið var. Men tað hevur tikið langa tíð at fáa nøkur viðurskifti upp á pláss, sum vóru krøv frá reiðaríinum, áðrenn Clare kundi taka siglingina upp.

– Men tey viðurskiftini eru so komin upp á pláss nú, og nú fer hetta at standa sína roynd.

Heðin sigur, at tað er torført at siga nakað um gongdina enn, men hann vísir á, at Clare hevur siglt til Suðuroyar í eina tíð nú, og tað hevur víst seg at virkað avbera væl.

– Stuðulin úr Suðuroynni hevur verið sera stórur, og vit vóna, at tað fer at verða tað sama í Klaksvík, sigur hann og vísir samstundis á, at Klaksvík er ein stórur partur av útflutninginum, serliga tá hugsað verður um nógva fiskin.

Koyring í sambandi við siglingina, tað vil siga, at syrgja fyri at vognar eru til taks og annað tílíkt, hevur OCD um hendi.

Men Heðin heldur ikki, at tað átti at merkt so væl hjá flutningsfyritøkum, sum hava koyring til og frá Klaksvík enn.

– Hetta er enn so nýtt, sum sagt, so um flutningurin er minkaður, so er tað helst aðrar orsøkir til tað, metir hann.

– Vit hava valt at hava eina fyritøku til alla koyringina kring landið í hesum sambandinum, tað meta vit at egna seg best, sigur Heðin Joensen, sølu og marknaðarleiðari á Farmadeildini hjá Smyril Line at enda.



*Clare siglir til Klaksvíkar hvønn týsdag. Hon leggur at um ellivu tíðina fyrrapart og fer aftur til Havnar um trý tíðina seinnapart*

# Flutningurin minni enn væntað

**Petur í Gong frá fyritøkuni Elmar Zachariassen í Klaksvík sigur, at flutningurin eftir summarfrítíðina hjá virkjunum hevur verið minni enn væntað**

FLUTNINGUR
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:** Petur sigur, at tað er við flutningi sum við øllum øðrum, tað er upp og niður.

– Vit høvdu væntað meira eftir summarsteðgin, men tað hevur verið minni fiskur, so tað sigur seg sjálvt, at tað ávirkar flutningin, sigur hann.

Hann heldur ikki, at tað merkist væl, at Clare er byrjað at sigla.

– Sjálvandi merkist tað, men tað er ofta bert eitt upplop tann fyrsta mánaðin, so javnar tað seg út. Tað var tað sama, tá Eimskip byrjaði at sigla upp á Klaksvík, tað var nógv í byrjanini, men so bleiv tað meiri javnt.

Og hann leggur afturat, at um tað fer at merkjast á nakran hátt, at OCD hevur koyringina í samband við Clare, so kann tað væntast at fara merkjast tann positiva vegin fyri PF Elmar Zachariassen.

– Tað at Clare siglir ger, at tað verður minni koyring hjá OCD her, og tað má bara sigast at koma væl við hjá okkum, tí teir eru jú kappingarneytar.

Petur veit ikki, um tað er so skilagott at hava týsdag sum avskipingardag.

– Vit hava vanliga havt fríggjadag til avskiping, og fyri at siga tað, sum tað er, so eru fyritøkur og virkir her ofta eitt sindur sein við avskipingini, og tí veit eg satt at siga ikki, um týsdagur er ein so góður dagur at velja sær. Men vit fáa sjálvandi at síggja, sigur hann.

PF Elmar Zachariassen er ein fyritøka, sum tekur sær av øllum flutningi, sum er. Bæði maskinur, lastbil, bingju og fiskaflutning, umframt vøruflutning. Tað einasta sum fyritøkan ikki hevur, er kranabil.

Herfyri bjóðaði fyritøkan upp á koyringina hjá Føroya Bjór uttanfyri Klaksvík og fekk hana.

Tann koyringin hevur víst seg at eydnast avbera væl, og Petur sigur, at tað verður latið væl at frá báðum pørtum.

– Ein tílík koyring javnar arbeiðsbýtið í vikuni út, tí at vit hava sum oftast nógv at gera seinnapartarnar av vikuni, tí tá byrjar avskiping og tílíkt, meðan Føroya Bjór koyringin oftast liggur fyrrapartin av vikuna, so tað hevur riggað sera væl, heldur Petur í Gong.

Hann leggur afturat, at tað ongantíð hevur verið nakar ivi um, teir fóru at megna tað, men tað hevur í roynd og veru gingið betur enn væntað.

### Virkisflutningur

Formaðurin í ráfiskagrunninum segði herfyri, at í sambandi við studningin til virkini, so er spurningurin, um tað ikki er líka gott at gera eina flutningsfyritøku til virkini. Men hesum er Petur í Gong als ikki samdur í.

– So kann man líka so væl droppa alt og fara aftur til bert at hava Strandferðsluna, tí sum er, við teimum privatu flutningsfyritøkunum og Strandferðsluni, so er ongin orsøk til at gera eina fyritøku aftur at bara til virkini, heldur hann.

Harafturat sigur hann, at tað er kappingaravlagandi.

Hann vísir eisini á, at hóast talan er um, at so fáa øll virkir somu treytir og prísir, so er tað ikki víst, at tað fer at verða ein fyrimunur fyri øll virkini.

– Um vit nú eru bíligari enn ein møgulig fiskaflutningsfyritøka hevði verðið, so hevði tað jú ikki verið ein fyrimunur fyri tey virkini, at ein tílík fyritøka hevði verðið.

Petur í Gong heldur, at hetta uppskotið varð sammett við pakningin, sum í dag verður keyptur inn til øll virki í landinum, men hann vísir á, at pakningurin verður keyptur uttanlanda, meðan flutningurin eru fyritøkur her í landinum.

– Men eg havi ikki sæð nakra viðmerking til hatta enn, so kanska tað ikki er tikið fyri fult, sigur Petur í Gong.



Álvur Kirke:

# —Tey grundleggjandi virðini verða hótt

**Av sínum eintingum er Álvur Kirke farin undir at savna undirskriftir í mótmæli til yvirlýsingina. —Tað er eitt grundleggjandi mótmæli móti humanistisku fatanini, sum er reinur heiðinskapur, sigur Álvur**

MÓTMÆLI
*Heri á Rógvi*

Í føroysku bløðunum hin 21. september 2002 stóð ein yvirlýsing at lesa. Yvirlýsingin stóð at vera til frama fyri rættindum teirra samkyndu og mótmæli móti samanvavstri av átrúnaði og politikki. Eini 325 løgdu fult navn til.

Eisini stendur at lesa:

" Tey samkyndu, sum av ymiskum orsøkum ikki hava megnað at funnið sær fríðskjól uttanlands, hava livað í Føroyum undir stødugari hóttan og niðurgering.

Hetta kann als ikki góðtakast í einum siviliseraðum og demokratiskum samfelagi, sum byggir á humanistiska siðvenju. Í kjakinum um eina møguliga lóg um skrásett parlag hava átrúnaðarligir bólkar ført tað sjónarmið fram, at átrúnaðarligar skriftir skulu vera grundarlagið undir lóggávuni í Føroyum. Hetta sjónarmiðið hevur verið brúkt sum grundgeving fyri at forða fyri einari lóg um skrásett parlag fyri samkynd."

Tað er eisini í hesum pettinum, at finna orsøkina til, at Álvur Kirke hevur tikið stig at savna undirskriftir.

—Talan er um eitt grundleggjandi mótmæli ímóti, at vit byggja á okkara samfelag á humanisku heldur enn kristnu siðalæruna, sigur Álvur Kirke.

— Vit hava í seinastuni sæð, at arbeitt verður fyri at broyta Føroyar til eitt sekulariserað samfelag, sum byggir á humanismu — ístaðin fyri á kristnu siðalæruna.

Valið stendur millum Bibliuna og modernaðan heiðinskap, sum verður kallaður humanisma!, stendur at lesa í áheitanini, sum fylgir við lepanum, har fólk kunnu skriva undir.

—Lesur mann yvirlýsingina, so vil mann har sleppa undan bibliuni. Tað er eisini skeivt, tá tey kalla bibliuna fyri átrúnaðarligar tekstir. Hetta er guds orð, og tað er stórur munur á tí í mínari verð, sigur Álvur Kirke.

### Bivirkningur

Orðaljóðið í áheitanini hjá Álvi er soljóðandi í yvirskriftini:

"Áheitan um at skriva undir yvirlýsing til frama fyri kristnu siðalæruna, og mótmæli ímóti lógaruppskoti um skrásett parlag fyri samkynd í Føroyum."

Hóast hetta, so er tað ikki tað skrásetta parlag, ið fyrst og fremst hevur fingið Álv Kirke at fara undir at savna undirskriftir.

—Samkynd parlag er ikki tað ringasta. Tað er ein bivirkningur sum so nógv annað. Men tað grundleggjandi skeivt í mínar verð og skelkandi, tá fólk royna at broyta okkara livihátt frá teirri kristnu siðalæruni, sum okkara byggir á, sigur Álvur Kirke.

### Einki negativt

Hóast Álvur Kirke er aktivur í samkomu og í Miðflokkinum, so hevur hendan innsavningin rein persónlig fyri hann.

—Eg hevði hoyrt nógv fólkt tosa um, at okkurt skuldi verið gjørt fyri mótmæla, og eg hugsaði so, at tað kundi tað sama verða eg, sigur Álvur Kirke.

Hann leggur dent á, at hetta er púrasta ein persónlig avgerð, og hon nevnir skemtandi, at tað bert var sonurin og ikki konan, sum visti av, at nú fór hann undir hetta átakið.

Freistin til innsavningina er sett til fríggjadagin 11. oktober. So skal Álvur undir at savna alt saman. Hann roknar við, at tað fer at taka tað mesta av næstu viku at fáa alt savna saman, og tí er ilt at siga, nær undirskriftirnar verða handaðar løgtinginum, sum ætlanin er.

Sjálvur sigur Álvur, at hann ongan negativur viðmerkingar hevur fingið, og eingin hevur sent pappírini aftur retur.

*Er tú so ein fundamentalistur?*

–Eg byggi á eitt kristiligt fundament, og so kunnu tey kalla meg, hvat tey vilja, sigur Álvur Kirke.



*Álvur Kirke, stigtakari til innsavningina, letur væl at innsavningini higartil. Hann sigur seg ikki hava fingið nakra negativa viðmerking.*




*Í samkomum, á bensinstøðum og handlum og á nøkrum arbeiðsplássum liggja pappírini frammi, har fólk hava møguleikan at mótmæla. Stigtakarin letur væl at úrtøkuni higartil.*

## Virðið ivasamt

**Undirskriftir í mótmælum vísa meiningar hjá fólki, men eru ikki bindandi og verða heldur ikki eftirkannaðar**

UNDIRSKRIFTIR
*Heri á Rógvi*

Sum nevnt aðrastaðni á síðuni hevur Álvur Kirke tikið stig til at savna inn undirskriftir í mótmæli til yvirlýsingina frá teimum mongu føroyingunum herfyri.

Spurningurin er so bara, hvat virði ein sovorðnar undirskriftir hava.

Eyðfinn Jacobsen, advokatur hjá Faroe Law, sigur, at tílíkar undirskriftir er meiningavísandi í demokratinum.

Fólk kunnu sum einki skrivað fleiri nøvn.

—Tað er sjálvandi ikki loyvt at falsa, men í hesum førinum fær tað bert moralskt eftirspæl. Tann einstaki bindur seg ikki til nakað - hann sigur bert sína hugsan alment, sigur Eyðfinn Jacobsen.

Sjúrður Rasmussen, løgfrøðingur á Løgtingsskrivstovuni, sigur, at teir ikki gera nakað við at kanna undirskriftar.

—Undirskriftar kunnu fáa politiska ávirkan, men annars hava tær einki at siga, sigur Sjúrður.

Hann vísir á, at í ávísum statum í USA kunnu nógvar undirskriftir fáa ávís uppskot ígjøgnum. Við innsavnan av undirskriftum til nýggjan flokk eru heilt aðrar reglur galdandi, sigur Sjúrður.

Álvur Kirke veit ikki heilt, hvørja mannagongd hann fer at velja.

—Nøvni verða tald upp, og originalurin verður latin løgtingsformanninum, men í fyrstu atløgu verða nøvnini ikki almannakunngjørd, sigur Álvur Kirke.